# Okkum vantar BILAR

Vegna øktan eftirspurning uppá brúktar bilar í prísleguni upp til Kr. 50.000,- vantar okkum bilar frá Kr. 5.000,- til 50.000,-





Vit hava góðar og lítið brúktar bilar at bjóða tykkum ístaðin.

**Úrvalið er stórt og vit bjóða góða fígging.**

**Støkk inn á gólvið og lat okkum fáa eitt bilprát.**

undir Krákugjógv 19 · Tórshavn · tel 34 54 00 · fax 34 54 03

**Auto Service**

www.autoservice.fo



**SEV**

www.sev.fo

## Kundi tú hugsa tær starv hjá SEV?

Tvey størv sum arbeiðsfólk ella handverkari innan linjuøkið hjá SEV í Norðurøkinum eru leys at søkja til setan skjótast tilber. Møguleiki er, eftir eina tíð í starvi, at verða útnevnd/ur linjufólk/montørur.

**Starvið**
Tú kemur at arbeiða í einum toymi, ið hevur Eysturoynna og Norðuroyggjar sum arbeiðsøki. Arbeiðsuppgávunar hjá toyminum eru viðlíkahald og nýgerð av el-kervinum hjá SEV. Toymið arbeiðir útfrá verkstaðnum hjá SEV í Klaksvík.

**Førleikar**
Tað eru eingi serstøk krøv til úbúgving. Vit skipa fyri neyðugum skeiðum og førleikamenning. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við arbeiði innan líknandi øki, og at tú hevur koyrikort.

Vit vænta at tú hevur góð evni at samskifta og samstarva, er fyrikomandi og jalig/ur av lyndi.

**Løn**
Starvið verður lønt við tímaløn + starvsaldur sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við møguligum ummælum til:

**Elfelagið SEV**
**Landavegur 92**
**Postrúm 319**
**110 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er mikudagin 18. mars 2009.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jón Nielsen á telefon nr. 346800.

ELFELAGIÐ SEV · POSTSMOGA 319 · 110 TÓRSHAVN · WWW.SEV.FO · SEV@SEV.FO



# Altjóða kvinnudagur 2009

## Norðurlandahúsið sunnudagin 8. mars kl. 14-18





- Lisbeth Nebelong: Frá undirskoti til yvirskot
  – tveir tímar við fyrilestri og workshop um privatøkonomi
- Katrin Petersen, journalistur, hugleiðir um íbornu kynsrollurnar
- Studentaskúlanæmingar framføra eina variatión yvir *Eitt dukkuheim* hjá Ibsen
- Elin x 2 – um at vera ein almennur persónur og stjóri, sum øll hava sína hugsan um
- Kvinnukórið Cantabile
- Synergi: Er ljósareytt óseriøst?
- Framsýning við Amnesty Føroya deild og SEV

Kvinnufelagið í Havn og Kvinnufelagasamskipan Føroya

Stuðlað hava: Mekta · Tryggingarfelagið Føroyar · Ikon · Norðurlandahúsið · Føroya Banki · Sosialurin · Føroya Bjór